Okkara møguleiki

Í royndunum at vinna steypafinaluna hava sørvingar fingið hjálp frá einum av veteranunum, og Annfinn Joensen heldur, at hetta er stóri møguleikin hjá SÍ at fáa okkurt slag av gulli burtur úr árinum

FLOGBÓLTSUPPTAKT
Jákup Mørk

Í Sørvági hava tey lagt nógv fyri við flogbóltinum í ár. Liðið er styrkt við fremmandum leikarum, og tá teir heimligu samstundis hava lagt nógv fyri, hevur úrslitið av hesum heldur ikki ligið eftir. Tó skal leggjast afturat, at tað neyvan verður talan um gullmerki til SÍ í ár. Tapini herfyri móti Fleyr og ÍF vóru sera dýr í so máta, og kanska júst tí eru sørvingar sera uppsettir til dystin leygardagin.

Veteranur verður við

Ein av leikarunum, sum verður við leygardagin, men sum annars hevur verið burturi frá flogbóltinum í eina tíð, er Annfinn Joensen. Sjálvir rópar hann seg fyri okkurt slag av jokara, sum teir hava grivið fram til dystin, men fyri tað gleðir hann seg eins nógv sum liðfelagarnir til finaluna.

Á heimasíðuni hjá FBF hevur ein sonevnd quickpoll kanning verið gjørt seinastu vikuna, og sum vit skrivaðu í gjár, so er SÍ stórur favorittur sambært hesari. Annfinnur viðgongur, at nakað kann vera um leiklutin sum favorittur, men at teir tó ikki taka nakað fyri givið.

- Nú vóru fuglfirðingar sjálvandi sera óhepnir í seinasta dystinum, tá Odd noyddist av vøllinum við skaða. Nú havi eg als ikki sæð ÍF spælt í ár, men úrslitini siga somikið sum tað, at meðan hann ikki var á liðnum, gekk einki serligt hjá teimum, meðan tað hinvegin hevur gingið væl í endaspælinum, so talan er í øllum førum um ein sera týðandi leikara hjá teimum. Tað er í øllum førum nakað, sum átti gjørt okkum til eitt slag av favorittum, hóast tú altið skalt vera varin við at siga soleiðis, heldur Anfinn.

- Tað er tó soleiðis, at við ÍF kanst tú ongan tíð kenna teg heilt tryggan. Bartal, sum ikki var við seinast, verður eisini við teimum hendan dystin, og einki er at ivast í, at teir spæla fyri at vinna, so sigurin fer á ongan hátt at koma av sær sjálvum.

Tað kann í hvussu so er roknast við, at Annfinn Joensen við sínum 195 cm verður ein styrkur framman fyri netið hjá SÍ

Nervarnir hava svikið

Eitt skifti í landskappingini sá annars út til, at sigrarnir fóru at koma av sær sjálvum. SÍ lá sera væl fyri, men sum nevnt omanfyri, so er nú líkt til, at gullið kortini fer til Fleyr, og hetta vísir Annfinn eisini á, tá tosað verður um tað trýst, sum er á leikarum í einum finaludysti.

- Tað hevur í hvussu so er sæð soleiðis út, at liðið hjá okkum ikki hevur megnað at avgjørt dystirnar, og tað er fyrst og fremst okkara egna skyld, at vit ikki liggja betri fyri. Bæði móti Fleyr og ÍF restaði bert ein boltur í, men vit mistu kortini.

Spurdur, um hetta er orsøkin til, at teir nú hava heitt á seg, er Annfinn eitt sindur ivandi.

- Tað veit eg nú ikki. Vónandi kann tað hava eina positiva ávirkan, at eg hóast alt havi eitt sindur av royndum, men tað dugi eg ikki at siga.

Okkara møguleiki

Um áhugan til finaluna, sigur Annfinn, at hann man vera hampuliga stórur.

- Eg havi kanska ikki merkt so nógv, tí eg havi verið so lítið við í ár. Eg havi tó lagt til merkis, at uppsløg hava hingið frammi í onkrum handlum, so vónandi fara fleiri áskoðarar at fylgja okkum.

- Hjá leikarum er tó eingin ivi um, at spenningurin er stórur. Tað er meira ella minni kleyvarskapur, at vit nú eru úti av gullstríðnum í landskappingini, so hetta er okkara møguleiki at fáa nakað burtur úr árinum, sigur hann avgjørdur at enda.

Eitt sindur um liðini

	SÍ	-	ÍF
Miðalhædd	183,7 cm	-	184,2 cm
Lægsti leikari	171 cm	-	178 cm
Hægsti leikari	201 cm	-	191 cm
Landsdystir í miðal	8,8	-	5,8
Flestar landsdystir	64	-	26
Miðalaldur	22,9 ár	-	24,8 ár
Elsti leikari	38 ár	-	39 ár
Yngsti leikari	16 ár	-	17 ár

Ábyrgdin skiftir herðar

Hóast fuglfirðingar eru rættiliga skerdir undan finaludystinum, so hava teir á ongan hátt mist vónina fyri einum sigri. Men teir leggja dent á, at tað krevur eitt sera gott avrik

FLOGBÓLTSFINALA
Jákup Mørk

Tað verður eitt skert ÍF-lið, sum fer á vøllin í dag. Í mun til liðið, sum byrjaði endaspælið so væl, eru bæði Odd Eliasen og Jan Áki Olsen brádliga skaddir, og tað skerst ikki burtur, at hetta minkar um vónirnar í Fuglafirði.

- Tað er so einki at ivast í, at tað ger liðið veikari, heldur liðskiparin hjá ÍF, Bartal Eliasen, tá vit spryja hann um vónirnar, nú liðið hevur verið so ógvulislum bakkastum. Sjálvur hevur Bartal eisini verið uttanlands við fótbóltslandsliðnum, so fyririekingarnar hjá ÍF hava verið alt annað enn optimalar.

- Vit fara tó framvegis á vøllin fyri at vinna, og sjálvur trúgvi eg eisini uppá, at tað kann lata seg gera. Gera vit ikki tað, so kunnu vit akkurát tað sama lata vera við at møta upp, heldur hann.

Tað er serliga í verjuni, at ÍF kann leggja grundarlagið fyri einum sigri heldur liðskiparin hjá liðnum, Bartal Eliasen

SÍ eru favorittar

Hóast vónirnar soleiðis tykjast góðar, so heldur Bartal tó, at eftir alt hetta, so má tað vera SÍ, sum sleppur at bera favorittheitið undan dystinum.

- Var tað ikki fyri hesar skaðarnar, so haldi eg, at talan hevði verið um tvey sera jøvn lið, men hetta ger sjálvandi, at teir mugu metast sum favorittar. Vit hava sjálvandi roynt, at bøtt liðið, og eitt nú verður Bjarne Joensen aftur við hjá okkum, men vit fáa so at síggja, hvussu tað fer at spæla av.

Á einum øki eru fuglfirðingar framman fyri SÍ, og tað er, at ÍF hevur roynt at leikt slíka finalu fyrr. Men hóast hetta sjálvandi hevur givið teimum nakrar royndir, so heldur Bartal ikki, at tað verða royndirnar, sum fara at gera munin.

- Tað hevur einki at siga. Í fjør var tað Mjølnir, sum hevði royndirnar, men tá vunnu vit kortini trygt, so hatta hevur ikki nakað upp á seg, sigur hann avgjørdur.

Vónar stuðul

Um áhugan fyri dystinum sigur Bartal, at tað hevur hann sum so ikki so góða føling við.

- Nú eri eg akkurát afturkomin, so eg veit ikki rættiliga, hvat eg skal siga. Tað verður tó skipað fyri bussferð, og sjálvandi vóni eg, at nógv taka av hesum. Tað gjørdu tey í fjør, tá vit spældu móti Mjølni. Tá var rómurin øgiligur í høllini. Nakað sum gjørdi dystin eyka stuttligan.

Tá vit at enda spyrja Bartal, hvat verður avgerandi fyri teirra leiklut í dystinum, er hann sera avgjørdur, tá hann svarar verjan. Annars hevur álopið og serliga kantarnir verið sterkasta vápnið hjá fuglfirðingunum, men Bartal heldur sjálvur, at riggar verjan, so skal hitt nokk koma.

- Tað ræður um at vera sterkur í blokkinum og finna røttu støðurnar á vøllinum. Tað er grundarlagið undir álopinum, so tað skal fyrst fáast í rættlag. Og nú vit hava mist nakrar kreftir, verður tað kanska neyðugt hjá onkrum av teimum ungu at traðka meira fram. Gera teir tað, so ivist eg ikki í, at vit kunnu fáa ein sigur burtur úr dystinum, sigur Bartal Eliasen at enda.

ÍF-Kyndil 34-14 (18-4):

Sorl í Vestmanna

Einki var at rafla um, tá einaráðandi oddaliðið úr Vestmanna tók ímóti botnliðnum, Kyndli, hóskvøldið

HONDBÓLTUR – KVINNUR
Jákup Mørk

Tað var kanska ikki annað væntandi, men úrslitið av dystinum millum VÍF og Kyndil gjørdist ein knúsandi stórsigur til einaráðandi oddaliðið úr Vestmanna.

Snøgt sagt ongan tíð í dystinum fekk Kyndil somikið sum annan fótin fyri seg, og at tær bert fingu fýra mál í ein heilan hálvleik sigur kanska eisini nakað um munin, sum var ímillum liðini. Ikki minst, tá lagt verður afturat, at tvey av hesum fýra komu innan fyrstu fimm minuttirnar, meðan VÍF framvegis var í gongd við upphiting sína.

Eftir hesa gjørdist talan um eitt rættuligt ódnarveður, har kósin varð sett beint móti Kyndils-málinum, og so kundi tað annars gera tað sama, hvussu tær úr Kyndli royndu at verja. Fremsta endamál teirra í so máta mundi bara vera at avmarka stórtapið, men við 20 málum á muni, kann heldur ikki sigast, at hetta eydnaðist.

Eingin sum helst ivi var um útfallið, tá VÍF rætt og slætt vant burtur úr Kyndli hóskvøldið

Steðfesti støðuna

Fyri Kyndil var tapið enn ein staðfesting av, at tað verður við tógvið stríð, um tað skal eydnast liðnum at bjarga tilveruni í bestu deildini. Sjálvandi er tað eingin katastrofa at tapa ímóti VÍF, og málmunurin hjá liðnum tolir væl eitt slíkt tap, sammett við hini botnliðini, men í løtuni tykist, at allur stríðsvilji er farin úr liðnum, og hesin skal í øllum førum finnast aftur, um bjargingin skal hómast.

Hjá VÍF er støðan júst hin øvugta. Sigurin og støddin á hesum var meira enn nakað annað ein styrkisuppvísing mótvegis hinum liðunum í deildini, og sum støðan er í løtuni, so bíða vestmenningar bert eftir, at gullið er matematiskt trygt, áðrenn veruligu fyrireikingarnar til enn eina gullveitslu fara fram.

Dysturin í tølum

VÍF-Kyndil 34-14 (18-4)

Málskjúttar:
VÍF: Ioana Rápa 11(2), Sóley Mikkelsen 6(2), Nikolina Eyðbjørnsdóttir 5, Nicoleta Radu 5, Alis Høghamar 3, Jacklin Durhuus 2, Manuela Stan 1, Fríða Marjunardóttir 1
Kyndil: Annika Ljósstein 4, Ann Mari Wang 2, Ann Hansen 2, Anja Johannesen 2, Lotte Sørensen 2, Linda Seihe 1, Jensia Petersen 1
Brotskøst: VÍF 6, Kyndil 4
Útvísingar: VÍF 2, Kyndil 8
Diskvalifikatión: Kyndil 1 (3X2 minuttir)
Dómarar úr Tjaldri: Hartvig Joensen & Kári Hansen.

VÍF-Kyndil 29-24 (13-6):

Ein hálvleikur var nokk

Í ein hálvleik skapti VÍF sær trygga leiðslu móti Kyndli, og so kundi tað gera tað sama, at avrikið ikki var sannførandi seinna umfarið

HONDBÓLTUR – MENN
Jákup Mørk

Klassikarin í føroyskum hondbólti hevur í ár verið heldur tamur. Eftir at dystirnir ímillum VÍF og Kyndil mangan hava verið spennandi og javnir, er styrksmunurin millum arvafiggindarnar nú vorðin somikið sjónskur, at tað vildi verið ein verulig sensatión, um Kyndil fór at gera nakað við oddaliðið hósdagin.

Fyrra var nokk

Tað megnaði Kyndil sum so heldur ikki, og tað var heldur ikki nær við.

VÍF legði heilt tíðliga í dystinum sjógv ímillum, og sum fyrri hálvleikur leið, so lúrdi vandin fyri einum stórtapið, líknandi tí, sum kvinnurnar hjá Kyndli høvdu verið fyri beint áðrenn.

Somikið galið gekst tó ongantíð. Kanska ótilvitað slakaði VÍF eitt sindur í seinna hálva tímanum, og stríðsviljin hjá Kyndli viðførdi so, at talan gjørdist um rættiliga javnan seinna hálvleik. Eitt skifti fekk Kyndil enntá minkað munin niður í tvey mál, men so var eisini uppi. Stóra takið hevði kostað nógv, og tá VÍF so aftur setti ferð á, so fingu teir togað ein hampuliga sannførandi sigur heim.

Røtt avgerð

VÍF uppfylti við sigrinum enn eina av fortreytunum fyri gullinum, sum teir ætlandi fáa um fáar vikur. Verður talan um sigur í fimm av seinastu sjey dystunum, so er gullið víst, og nú allir mans í hópinum – við undantaki av Eli Müller – aftur tykjast klárir, er ilt at síggja, hvussu alt skal tveitast fyri borð seinastu dystirnar.

Eftir enn ein skaðasteðg er Áki Olsen nú aftuir við VÍF, og tað ger so avgjørt ikki fortreytirnar fyri enn einum gullmerki verri

Kyndil fær neyvan heiðursmerki í ár, men avrikið í endaspælinum hevur í øllum førum prógvað, at liðið neyvan er tann botnkandidaturin, sum grundspælið annars bendi á. Fyrst og fremst hevur góði stríðsviljin á liðnum togað teir uppeftir, og við royndunum, sum liðið í ár hevur fingið sær, so kann tað kanska vísa seg, at avgerðin um at byrja frá grundini hetta kappingarárið kanska er ein hin besta, sum er tikin í félagnum. Eisini hóast tað fyri trimum mánaðum síðani viðførdi, at nógv av viðhaldsfólkunum bert ristu við høvdinum, meðan tap eftir tap kom á kontina.

Dysturin í tølum

VÍF-Kyndil 29-24 (13-6)

Málskjúttar:
VÍF: Áki Olsen 8(1), Sámal Joensen 4, Daniel Rápa 4, Piti Negru 4, Petur Fr. Joensen 2, Johnny Joensen 2, Ragnar Zachariasen 2, Ingi Olæsen 1, Harald Bjørgvin 1, Agnar Joensen 1
Kyndil: Bárður Johannesen 11(3), Jónleif Sólsker 5, Regin Johannesen 4, Høgni Klein 2, Josef Abrahamsen 1, Janus Einar Sørensen 1
Brotskøst: VÍF 3, Kyndil 6
Útvísingar: VÍF 6, Kyndil 6
Dómarar úr Tjaldir: Hartvig Joensen & Kári Hansen.

Hondbóltsstøður

1. Deild kvinnur

		dystir	v - j - t	tapt mál	mál-mál	munur	stig
1	VÍF	5	5 - 0 - 0	499	297	202	22
2	Stjørnan	5	3 - 0 - 2	434	355	79	15
3	Neistin	6	3 - 1 - 2	400	351	49	15
4	VB	5	4 - 1 - 0	397	395	2	15
5	StÍF	5	2 - 0 - 3	321	402	-81	5
6	Sóljan	6	1 - 0 - 5	330	499	-169	4
7	Kyndil	6	0 - 0 - 6	406	488	-82	3

1. Deild menn

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	VÍF	5	5 - 0 - 0	499	410	89	21
2	Neistin	5	3 - 0 - 2	523	446	77	16
3	StÍF	5	4 - 0 - 1	470	454	16	14
4	H71	5	0 - 2 - 3	470	498	-28	8
5	Tjaldur	5	2 - 0 - 3	423	478	-55	8
6	Kyndil	6	2 - 1 - 3	419	470	-51	7
7	KÍF	5	0 - 1 - 4	447	495	-48	5

Máltindarnir

Kvinnur:

Asta Petrauskiene	Sóljan	153	(24)
Simona Dziugyte	Stjørnan	142	(42)
Lotte Sørensen	Kyndil	129	(55)
Ioana Rápa	VÍF	123	(28)
Gabriella Fekete	VB	105	(27)
Annika Ljósstein	Kyndil	94	(14)
Ileana Manulescu	StÍF	93	(15)
Regina Radó	VB	90	(21)
Joan M. Joensen	Stjørnan	86	(7)
Katrin á Neystabø	Neistin	86	(37)
Sóley Mikkelsen	VÍF	81	(15)
Anna K. Samson	Stjørnan	76	(1)
Jacklin Durhuus	VÍF	70	(4)
Birita Wardum	Neistin	70	(11)
Andrijana Milodanovic	Stjørnan	66	(9)

Menn:

Bjarni Wardum	H71	117	(27)
Jacob Jónsson	Neistin	114	(15)
Heini Joensen	Neistin	111	(35)
Høgni Klein	Kyndil	107	(9)
Costin Dumitrescu	StÍF	104	(29)
Finnur Hansson	H71	97	(22)
Dragisa Stojovic	Tjaldur	96	
Halgir Dahl Olesen	H71	94	(11)
Ingi Olsen	VÍF	92	(11)
Sámal Joensen	VÍF	90	(13)
Artur Johansen	StÍF	88	(11)
Durica Tomic	KÍF	88	(23)
Iljan Topic	KÍF	87	
Sverri Justinussen	Tjaldur	86	(13)
Áki Olsen	VÍF	79	(11)